# Harmast vantandi virðing

**– Tað er ógvuliga harmiligt at slíkt skal koma fyri, men tá vit koyra VIP-kortegu, ber ikki til at steðga, heldur ikki tá vit møta einum líkfylgi, sigur Jón Klein Olsen.**




*Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, harmast hendingina sunnudagin, tá bilafylgið við Hendrikki, prinsi, møtti einum líkfylgi uttan at steðga*

Leo Poulsen

Tað fall onkrum fyri brótsið, at bilafylgið við Hendrikki, prinsi, ikki steðgaði, tá tað møtti einum líkfylgi sunnudagin. Men soleiðis eru reglurnar, og tað harmar Jón Klein Olsen, varapolitiinspektør.

– Tað er ein serføroyskur siður at steðga fyri einum líkfylgi og vísa sína virðing, og tað er hartil ein sera vakur siður. Tí harmar hendingin sunnudagin okkum ógvuliga nógv, og tað er eisini nakað, vit hava tosað nógv um. Men reglurnar í slíkum førum eru púra greiðar, og vit mugu undir ongum umstøðum steðga, sigur Jón Klein Olsen.

Hann sigur, at tað, sum lesarin hevur upplýst alt er satt, tó burtursæð frá, at bilafylgið setti ferðina nakað niður, tá koyrt varð fram við líkfylginum.

– Tá VIP'arar so sum tey kongaligu koma til landið, skulu tey altíð hava hægstu trygd. Tað merkir millum annað, at vit skulu halda vakt, meðan tey sova, so tað sigur seg sjálvt, at tað fyllir nógv í gerandisdegnum hjá løgregluni, tá slíkar vitjanir eru, sigur Jón Klein Olsen.

Føroyar verða annars roknaðar sum eitt »low-risk« land, men fyri tað skal trygdin verða í hásæti, og tað merkir eitt nú, at bilafylgið ikki má steðga, heldur ikki fyri at halda ein so vakran sið sum at vísa virðing fyri líki.

# Okkara øl á trappuni

**– Vit hava royndarkoyrt skipanirnar í smáar tvær vikur nú, og vónandi verður fyrsta ølið í rúsunum kring landið til vikuskiftið, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Okkara.**

Leo Poulsen

Tað eru bara smáttaríir, ið mangla at koma upp á pláss, áðrenn nýggja ølið frá Okkara verður at finna á hillunum í rúsunum kring landið.

– Vit hava royndarkoyrt skipanirnar nú í smáar tvær vikur, og alt hevur víst seg at rigga eftir ætlan, sigur Wilhelm Petersen, stjóri.

Sum nakað nýtt í Føroyum verður ølið tappað á dósir, men bryggjaríið hevur eisini tappimaskinu til fløskur. Í fyrstu syftu verður tó bert tappað á dósir.

– Tað verður í fyrsta umfari bryggjað pilsnar, klassic og gull, men vit hava møguleika at kombinera okkara framleiðslu við serøl. Okkara serfrøðingar hava drúgvar royndir innan serøl eisini,




*Wilhelm Petersen, stjóri í Okkara, vónar og væntar, at fyrstu øldósirnar verða at fáa í rúsuhandlunum kring landið til vikuskiftið*

og tað verður helst arbeitt tann vegin seinni. Tá verður so talan um øl á fløsku, sigur Wilhelm Petersen.

Bryggjaríið hevur ein kapasitet upp á 1,3 milliónir litrar um árið, sum svarar til helvtina av føroyska ølmarknaðinum.

– Tað er sjálvandi ilt at siga, hvussu stóran marknaðarpart vit fara at fáa, tað havi eg ikki reiðiliga nakra viðmerking til. Men vit kunnu lættliga økja um kapasitetin, um so skuldi verið, sigur Wilhelm Petersen.

Hinvegin fer tað ikki at krevja tað stóra talið av starvsfólkum at reka bryggjaríið.

- Bryggjaríið er rættiliga automatiserað, og tí verður ikki talan um tað stóra talið av starvsfólkum. Vit verða nokk eini 5-6 fólk, tá alt er komið upp at koyra, sigur Wilhelm Petersen.

Enn vanta onkrir smálutir í einari avtalu við Rúsuna, men Wilhelm Petersen roknar við, at tað bert ganga fáir dagar til ølið er á marknaðinum.

- Vónandi ber til hjá fólki at keypa Okkara øl til hetta vikuskifti, sigur Wilhelm Petersen.

## Miðlar

Eydun Klakstein
*eydun@sosialurin.fo*



# Meira drama enn undirhald

Fótbóltur er gott sjónvarpsundirhald. Við hvørt tí at spælarar og lið eru flúgvandi og spæla undirhaldandi fótbólt. Við hvørt tí at tað hendir okkurt dramatiskt, og spenningurin er øgiligur. Men sjálvt tann treiskasti og mest sannførdi fótbóltsfjepparin má stundum viðurkenna, at fótbóltur í sjónvarpi kann eisini verða keðiligur.

Milliónir av fólkum hava glett seg til HM endaspælið í fótbólti, sum í hesum døgum verður spælt í Suðurafrika. Heimsins sterkastu fótbóltstjóðir bresta saman á leikavøllum har suðuri á jarðarknøttinum, og tað verður mett sum heimsins størsta ítróttarkapping. Og tá áhugin er stórur fyri einari kapping, so eru allar hugsandi sjónvarpsrásir eisini til reiðar at senda – ella kanska er tað øvugt.

Men endaspælið hesaferð hevur í størri mun verið drama og veitsla, enn tað hevur verið gott fótbóltsundirhald. Jú, víst hava summi roynt at undirhildið og spælt positivt, og summir spælarar hava verið í rætta lagnum, men alt og nógv av londunum spæla við einum støðugum ótta fyri at tapa, og disiplinin er so strong, at tað er trupult hjá bæði spælarum og liðum at lyfta seg.

Og tí hava mong sitið frammanfyri skíggjan – kanska nýggja flatskíggjan, sum kann takkla HD-sjónvarp – og smákett seg seinastu vikurnar. Hvar bleiv spruttandi fótbóltsspælið av? Hvar blivu málini og detaljurnar hjá Rooney, Messi og Torres av? Og hví tíma og vilja mætastu europeisku fótbóltstjóðirnar ikki meira? Tað sigur eitt sindur um Ongland, Frakland og Italia, at maskinfótbólturin hjá Týsklandi nú stendur fyri undirhaldinum.

Hava vit stundum saknað stóra fótbóltsundirhaldið, hevur tað tíbetur verið nógv drama á og kring vøllirnar í Suðurafrika. Fronsku heimsstjørnurnar gjørdu seg fullkomiliga fyri skommum, og teir skulu verða glaðir fyri, at guillotinan er avtikin sum revsiamboð. Ensku spælararnir vóru á reyvuni – tungari reyv – so leingi teirra HM vardi, og Italia fall tíbetur upp á tað, sum hevur eyðkent nógv av liðunum í hesi HM-kappingini – óttin fyri at tapa og manglandi vilji at spæla fyri at vinna.

Mest dramatisku løturnar hesaferð hava verið tær somu, sum tær eru í Robinson Ekspeditiónini, X-Factor og Paradise Hotel. Tá onkur skal sendast heim, hava vit upplivað lív, larm, kenslur, gleði og sorg. Tá tað er komið til skarpskeringar í avgerandi løtum seinast í dystunum, hava spælararnir givið tað, sum teir hava í sær. Sjálvt Italia spældi tá fantastiskan álopsfótbólt í eitt korter.

Men samanumtikið hevur HM-sjónvarpið í alt ov stóran mun verið merkt av taktiskum spennitroyggjum, ordan, disiplin og ótta fyri at tapa. Tað er sum, at tað mest avgerandi fyri nógvar av fótbóltsstjørnunum er, at teir mugu ikki gera nakað, sum fer at seta teir í vánaligt ljós, gera teir til skurkar, so heldur lata verða við at taka kjansin, sum kann skapa tað fantastiska, tað undirhaldandi, tað minniliga.

Enn eru átta avgerandi HM-dystir eftir at spæla. Royndirnar siga, at hesir dystirnir kunnu skjótt gerast tættir og varisligir, men lat okkum vóna, at tað fótbóltsliga undirhaldið, sum vit hava fingið ov lítið av higartil, fer at koma nú, tá ið tey allarbestu liðini eru eftir í kappingini og skulu dystast ímóti hvørjum øðrum.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*